Løgmaður heitir á partarnar á arbeiðsmarknaðinum:

# -Vísið samfelagssinni og finnið loysn nú

**Løgmaður kemur í samrøðu við Sosialin við eini inniligari og avgjørdari áheitan á partarnar á arbeiðsmarknaðinum um at kenna sína samfelagsskyldu og ábyrgd og syrgja fyri at finna eina semju og harvið vísa samfelagssinni.**

VERKFALL
*Jan Müller*



*Anfinn Kallsberg, løgmaður heldur tað átti at verið lagamanni at funnið eina semju*

- Tá fakfeløgini biðja politikararnar at halda fingrarnar vekk so gangi eg út frá, at tey syrgja fyri at finna fram til eina loysn, skjótt og væl. Vit hava onga ætlan um at leggja okkum út í nakað stríð á arbeiðsmarknaðinum sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður í eini viðmerking til støðuna á privata arbeiðsmarknaðinum, har verkfallið nú er farið inn í fjórðu vikuna.

Løgmaður sigur, at landsstýrið fer heldur ikki at leggja seg út í málið, hóast semingsmenninir hava givið skarvin yvir. Hatta mugu arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløgini finna út av sigur hann.

- Men kanst tú sum løgmaður bara standa og hyggja at, meðan alt samfelagið steðgar upp?

- Her er fakfelagsfrælsi og hava feløgini verkfalsrætt. Men tá man fær nøkur rættindi má tað so sanniliga eisini fyglja ábyrgd við, og hon er at finna eina semju í aktuellu støðuni. Tá tað almenna skipanin við semingstovni hevur givið uppat, so er tað bara teir báðir partarnir, sum kunnu finna fram til eina semju uttan tann triðja partin, sum er semingsstovnurin. Og tað haldi eg, at teir skulu syrgja fyri at fáa uppá pláss her og nú. Tað er at seta seg við samráðingarborðið og finna loysnina.

- Men er tað ikki júst uppgávan hjá semingsstovninum?

- Jú, men tá man ikki hevur álit á semingsstovninum, sum hann er, so er at finna loysnina uttan um hann.

- Men heldur tú ikki, at semingsstovnurin átti at hildið fram við at roynt seming uttan at leggja frá sær nú?

- Semingstovnurin er komin til sína endaliga niðurstøðu, nevniliga at hann kann ikki gera meira. Tað er annars ikki hann, sum hevur ábyrgdina av støðuni. Tað eru arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar, sum hava ábyrgd av hesi støðuni. Teir kunnu fáa hjálp frá semingsstovninum, um teir biðja um tað og eru samdir um tað. Tann dag í morgin. Men semingstovnurin hevur uppfatað støðuna soleiðis, at tað er als eingin vilji frá pørtunum at finna eina loysn, og tí ætlar stovnurrin ikki at sita við trupulleikanum, tí tað eru feløgini sjálvi, sum hava bæði avgerðarrættin og so sanniliga eisini ábyrgdina yvirfyri arbeiðsmarknaðinum og so sanniliga eisini nakrar samfelagsábyrgdir. Tað fylgja nakrar ábyrgdir við rættindunum.

Løgmaður vísir annars á, at semingsstovnurin er valdur eftir eini ávísari skipan, har semingsmenn ikki kunnu leggja frá sær uttan víðari.

- Hava teir ikki lagt frá sær?

- Nei. Teir hava sagt, at teir eru givnir við seming í hesum málinum. Teir kunnu ikki leggja frá sær, tí hetta er eitt borgarligt starv. Sum støðan er vorðin taka teir tó einki stig og føla teir seg at vera leysar av málinum. Tí áliggur tað so mikið meir á pørtunum báðum.

### Samfelagsatlit

Fólk eru ørkymlað. Hvat sigur løgmaður til tað!

- Hetta er ein álvarslig støða fyri alt samfelagið, og eg meini, at feløgini hava eisini nøkur samfelagsatlit at taka. Og vóni eg at leiðslurnar, sum sita við hesum rættindum, eisini kenna tær skyldurnar út frá einum samfelagsligum sjónarmiði.

Løgmaður sigur, at nú mugu partarnir syrgja fyri at finna eina loysn og tað skal vera skjótt. Tí hetta samfelagið tolir hetta ikki. Hyggja vit eftir hesum út frá einum samfelagssjónarmiði, so er hetta reinur undirgangur fyri hvønn tíma, sum gongur. Fyri hvønn tíma, sum gongur, fara arbeiðspláss fyri skeyti í hesum samfelagnum, sum ongantíð koma aftur. Og jú fleiri dagar ganga, tess færri arbeiðspláss verða í hesum samfelagnum. Tað verður størri problem fyri okkara fólk frameftir.

-Vit eru farin inn í 4. vikuna við verkfalli. Hvussu leinki kann slíkt verkfall fáa loyvi at standa við?

- Tað veit eg ikki. Eg kann bara siga, at tað er ikki tann politiski myndugleikin, sum hevur ábyrgdina av hesum. Tað eru bara partarnir á arbeiðsmarknaðinum.

Løgmaður kemur við eini inniligari og avgjørdari áheitan á partarnar um at kenna sína samfelagsskyldu og ábyrgd og syrgja fyri at finna eina semju – at vísa samfelagssinni.

- Nú hevur tú verið leingi í politikki. Er hetta ein av ringastu støðunum tú hevur upplivað?

- Ein slík konflikt sum henda er altíð skaðilig. Men eg haldi, at tað man er ósamdur um, hóast alt, eru ikki so stórar upphæddir og serliga ikki við atliti at, hvørjir batar, sum liggja á borðinum í dag. Tað skuldi verið lagamanni at komið fram til eina semju.

- Skal hetta skiljast sum at arbeiðarafeløgini eiga at víkja frá sínum fullu krøvum?

- Nei, eg blandi meg ikki uppí hatta tjakið. Men eg biði partarnar um at hava samfelagsatlit eisini og longur enn til dagin í dag og í morgin men eisini fyri framtíðina hjá øllum føroyingum.

Anfinn Kallsberg heldur ikki, at tað vit longu hava mist orsakað av verkfallinum, kann gerast upp í pengini. Tað eru eisini viðurskifti, sum koma at broyta fortreytir langt fram í tíðina.

Bara spurningur um tíð:

# Til tað verður hungur og hall í hvørjum heimi

**- Eg vóni, at partarnir, sum hava henda rætt at samráðast eisini føla tað sum eina skyldu at koma til eina semju. Tríggjar vikur er alt alt ov long tíð at hava sitið bara og bíðað eftir hvørjum øðrum. Handlarnir stongja, og tað verður bara ein spurningur um tíð, til tað er hungur og hall í hvørjum heimi í Føroyum sigur løgmaður, sum eisini heldur skipanina við semingstovni verða avoldaða**

VERKFALL
*Jan Müller*

Anfinn Kallsberg, løgmaður heldur, at vit eiga at læra av hesi og øðrum støðum á arbeiðsmarknaðinum. Vit hava sum er eina avoldaða skipan. Tað vísir m.a. semingslógin, sum er frá 1926. Hana hevur man roynt politiskt at bøtt um men hevur kortini ikki hevur fingið ljóð frá pørtunum til at fremja broytingar.

- Tað er heilt givið, at um vit sum vælferðarsamfelag og ein trúverdugur samfelagspartnari frameftir skulu verða mettur sum ein seriøsur samarbeiðspartnari, so skulu heilt aðrar lóggávur til – nútímans lóggávur, sum øll onnur Norðurlond fyri langari tíð síðani hava fingið, men sum vit í Føroyum framvegis ikki hava fingið politiska semju um.

- Men hví hava politikarar sum tú og aðrir ikki syrgt fyri at broytt hesa lóggávu, áðrenn tað kom so langt sum til eitt slíkt verkfall?

- Tað er lættari sagt enn gjørt. Tað er einki at ivast í, at tað er altíð ein spurningur um støðurtakanir hjá fakfeløgunum, sum hava rættiliga stóra ávirkan á tað politiska landslagið og sum ger, at man ongantíð hevur funnið eina semju á hasum økinum. Tað er til stóran skaða, og tað síggja vit best nú.

- Men tit hava nú stýrt landinum í nærum fimm ár. Tit høvdu væl kunnað tikið og broytt hetta hesi árini?

- Avgjørt. Men tað hevur bara ikki borið til. Tað var settur ein arbeiðsbólkur við umboðum frá fakfeløgunum oø. og sum arbeiddi við einum lógaruppskoti, men so komu ymsar ósemjur, og alt fór í vaskið. Tú fært ikki eina slíka lóggávu ígjøgnum politiskt, um tú ikki fær partarnar á arbeiðsmarknaðinum við í tað arbeiðið. Men eg haldi, at allur arbeiðsmarknaðurin átti at verið áhugaður fyri, at vit fingu eina lóggávu, har vit fáa stabil viðurskifti á arbeiðsplássunum. Tí tað vera eingi størv til nakran, hava vit ikki stabil arbeiðspláss. Hetta hongur saman.

- Tá nú verkfallið er av við hesum ella hasum avleiðingunum, hvat fer Anfinn Kallsberg tá at fyritaka sær?

- Tað er heilt givið, at hetta við at fáa meira skipað viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, er avgjørt nakað, sum eigur at verða raðfest sera frammaliga.

### Heildaratlit

- Metir tú tað vera ein trupulleika, at man hevur eina samgongu og eina andstøðu, sum alt eftir hvørji politiskari støðu man er í, brúkar ella misbrúkar tí aktuellu støðuna fyri at vinna sær atkvøður?

- Tað er ein trupulleiki, at man ikki tekur heildaratlit, tá man skal skapa karmar fyri føroyska vinnu. Tað átti at verið ein felags áhugi fyri allar politiskar flokkar, fyri allar arbeiðsgevarar og fyri allar arbeiðarar og øll verkfólk yvirhøvur at gingið hond í hond fyri at fáa so trygg viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum sum gjørligt. Tað er tað vit øll høvdu vunnið av. Tað, sum er trupulleikin við einum verkfalli, er, at tað er eingin vinnari. Tað eru bara taparar, og tí skuldi tað verið áhugamálið hjá okkum øllum at fingið vent hesum, soleiðis at tað bara blivu vinnarar og eingir taparar.

- Kennir man seg ikki hjálparleysan at sita sum løgmaður í slíkari støðu?

- Tað ger man so avgjørt.

- Men fær man einki gjørt við tað?

- Sum politikarar eiga vit at leggja karmarnar, soleiðis at partarnir á arbeiðsmarknaðinum finna út av hesum í felagsskapi, tí tað, sum gagnar øðrum, gagnar eisini hinum. Men trupulleikin er tann, at tað sær út til, at man er ikki komin so langt sum at hava tað felags forstáilsi, ið skal til fyri at draga eina og somu línu. Fyrr enn vit eru komin hartil, eri eg vísur í, at vit fara at fáa afturvendandi verkføll við stórum taparum, har vit øll vera taparar og eingir vinnarar. Og tað er stórt spell.

- Hava arbeiðarafeløgini sett ov høg lønarkrøv?

- Eg fari ikki at døma um tað. Tað vit skulu ansa eftir og syrgja fyri er ikki at spenna bogan soleiðis, at tað, sum tann eini parturin ger, verður ein boomerangur, sum ger, at tað, sum skal vera grundarlagið fyri yvirhøvur at hava eitt arbeiði, fer fyri bakka. Tí er hetta alla tíðina ein spurningur um javnvág. Vit mugu hyggja eftir tí samlaða kappingarførinum hjá samfelagnum í mun til tey vit skulu kappast við. Klára vit ikki tað, so er tað heilt givið, at eftirspurningur ikki verður eftir føroyskum men eftir øðrum vørum, og tað ger so aftur, at vit fáa ikki tann útflutning, sum vit annars høvdu fingið. Og tað kemur aftur at hava við sær, at tað

*Framhald á síðu 34*



Býargartnarin:

# Fólk eru góð við Klaksvík

**Býargartnarin hjá Klaksvíkar kommunu hevur altíð úr at gera til norðoyastevnu. Hann og hansara fólk skulu syrgja fyri, at býurin er vakur og grønur á at líta, tá gestirnir koma á stevnu, men onkuntíð kann tað vera trupult at røkja sína uppgávu til fulnar**

GARTNARÍ
*Solby A.Eliasen*



*Hans Hjalti Skaale og tvey ára gamli sonurin, Janus, hava arbeitt við at fríðka Klaksvíkar bý til norðoyastevnu og summarið*

**Klaksvík:**
Tá ein kemur gangandi í miðbýnum í Klaksvík er tað ikki tann vakrasta sjónin, sum tekur ímóti einum fyri tíðina. Har bøur áður var grønur um hesa ársins tíð og trø stóðu í fagrasta blóma, er bert runa og órudd at síggja. Mitt í øllum stendur ein maskina hjá kommuni pinnastill, tí verkfall er, og tískil allir arbeiðsmenninir hjá kommuni ikki til arbeiðis. Ætlanin var helst hjá kommununi at fáa tað allarfyrsta av arbeiðinum av vegnum, so at tað kundi síggja so nøkulunda út til norðoyastevnu, men tað er ikki at eydnast.

Hóast henda sjónin ikki pyntar upp á miðbýin, so eru tað framvegis fleiri avbera vakrir blettir at síggja, har grønt gras, blómur og plantur av ymsum slagi standa so vakrar. Tað er býargartnarin og hansara fólk, sum taka sær av tí. Men nú meðan verkfall er, eru teir bert tveir til arbeiðis, og teir hava ov mikið at gera.

Henda dagin, tá Sosialurin kemur framvið, eru teir í ferð við at planta nakað av summarplantum niður við talvborðið í Vágstúni. Hans Hjalti Skaale er býargartnari og henda dagin hevur hann tvey ára gamla sonin, Janus, við, tí hann sleppur ikki í barnagarð, so longi verkfall er.

Men tað liggur væl fyri hjá teimum báðum feðgunum at vera til arbeiðis. Hans Hjalti letur væl at arbeiðinum í ár og sigur, at tað er nógv at gera hjá teimum. Hetta várið hava teir fingist við at flyta trøini, sum stóðu har arbeiðið upp á rundkoyringina nú er. Trøini hava teir tikið upp og sett runt ymsastaðni í býnum. Og tey fríðka um, har tey standa nú.

Í fýra ár hevur býargartnarin havt eina kampanju koyrandi, sum verður nevnd Planta eitt træ, har borgarar kunnu fáa ein pakka við trøum í, sum tey sjálvi so planta.

– Hetta gera vit fyri at fáa býin grønari, sigur Hans Hjalti, sum letur sera væl at undirtøkuni. Seinasta leygardag stóðu teir og býttu út. 300 pakkar vóru burtur eftir bara 40 minuttum, og tað vóru mong, sum onki fingu.

– Tað er harmiligt, at summi onki fáa, men vit hava bara eitt avmarkað tal av pakkum, greiðir hann frá. Og úrslitið frá hesum tiltakinum er nú av álvara farið at síggjast aftur, heldur Hans Hjalti Skaale.

– Tað fyrsta, sum vit lótu fyri fýra árum síðani, byrjar av sonnum at síggjast aftur nú, so ein kann bara ímynda sær, hvussu gott tað verður um eini 10 – 15 ár, sigur hann, meðan hann grevur eitt hol í moldina við góðari hjálp frá Janusi. Teir eru í ferð við at planta dianthus niður. Ein vøkur grøn summarplanta við ljósareyðum blómum á.

Tá prátið fellur inn á veður og vind, so sigur Hans Hjalti, at vøksturin hevur verið avbera góður í ár. Apríl mánaði var avbera góður, páskaliljurnar vóru í fullum blóma langt áðrenn páskir. Men hinvegin hevur mai mánaði verið minni góður, men tað hevur sum sagt ikki gjørt nakað verri fyri vøksturin.

### Góð við býin

Hans Hjalti sigur, at fólk í Klaksvík eru góð við býin. Alt, sum býargartnarin setur niður og plantar fær altíð frið - eisini á norðoyastevnu.

– Tað er ongantíð komið fyri, at vit hava verið noydd at taka niðurtraðkaðar plantur uppaftur eftir norðoyastevnu, sigur hann.

Lastin á bilinum hjá honum er full av ymsum summarplantum. Hann keypti inn undir seg, áðrenn verkfallið byrjaði, tí hann fær ongar plantur norður. Síðani hevur hann goymt tær, til nú tað er tíð at planta tær.

Og hóast tað er óvist, hvussu verður við norðoyastevnu, so skal býurin fríðkast og haldast við líka til summarið. Og røkt og viðlíkahald eru nakað, sum býargartnarin og hansara fólk mest taka sær av um summarið. Og tað skal gerast, um verkfall er ella ikki.

– Vit eru so væl fyri her, at vit eru tveir handverkarar til arbeiðis her, so alt er ikki steðgað upp kortini, sigur vælhýrdi býargartnarin í Klaksvík at enda.

# Brennievni til bilar undir verkfallinum

**Nú trot er á blýfríum bensini og dieselolju undir verkfallinum, eru tað nógvir bileigarar sum ikki vita, hvat teir kunna ella ikki mugu gera í sambandi við brennievni til bilin. Vit hava spurt okkum fyri á bildeildini á Tekniska Skúla, á bilverkstøðum og oljufeløgum**

BRENNIEVNI
*Magnus Gunnarsson*

Nú meðan verkfallið stendur við og trot er á blýfríum bensini og dieselolju, eru tað nógvir bileigarar sum seta sær ymiskar spurningar viðvíkjandi brennievni til teirra bilar. Ein av spurningunum er t.d. um bilar við katalysatori, sum einans skulu brúka blýfrítt bensin, kunna koyra við kaliumbensini. Ein annar spurningur er um dieselbilar kunnu brúka fýringsolju úr oljutanganum heima við hús. Vit hava spurt á bildeildini á Tekniska Skúla, á bilverkstøðum og hjá oljufeløgum. Viðvíkjandi tí at brúka kaliumbensin til bilar, sum eiga at brúka blýfrítt bensin, er niðurstøðan tann, at bilar við katalysatori skulu einans brúka blýfrítt bensin, men teir kunnu brúka kaliumbensin í smærri nøgdum, t.d. við at fylla tangan einaferð. Best er at spyrja seg fyri hjá bilasøluni, har bilurin er keyptur. Orsøkin til hetta fyrivarni er, at katalysatorin hevur keramikkanalir við eini skón av platin. Tá motorurin brennir kaliumbensin legst eitt lag av útlátinum á platini, og sum frá líður missur katalysatorin sín virkning. Allir bilar við katalysatori hava eina lambdasondu sum stýrir bensin- og luftmongdini til motorin, tað kann geva trupulleikar við motorgongdini, um man brúkar kaliumbensin. Bilar við katalysatori hava minni hol í spunslinum til bensináfyllingina, fyri at teir einans skulu brúka blýfrítt bensin.

### Ikki brúka fýringsolju

Ein annar spurningur er, um man kann brúka fýringsolju, úr oljutanganum heima við hús, til bilin. Tað verður frárátt av øllum, tí tann oljan er ikki ætlað til bilar. Til dieseloljuna, sum er ætlað til bilar, eru íblandingarevni latin út í, soleiðis at hon lýkur tey krøv sum bilverksmiðjurnar áseta. Serliga eru tað dieselbilarnir við beinleiðis innsprænging, sum fyri alt í verðini ikki mugu brúka fýringsolju. Innsprænings-pumpurnar koyra við so høgum trýsti, og eru so fíntfølandi, at bert eitt lítið rusk kann verða nokk til at tær taka skaða, og pumpurnar eru dýrar at umvæla. Tað verður heldur ikki tilrátt at brúka fýringsolju til teir gomlu dieselbilarnar. Teir kunnu fáa trupulleikar við motorgongdini, og motorurin fer at rúka. Nøkur bilverkstøð hava fingið bilar inn við trupulleikum, av tí at bileigarar hava nýtt fýringsolju til dieselbilar.

Niðurstøðan má so vera tann at teir bileigarar, sum brúka annað bensin ella aðra olju, enn tað sum bilverksmiðjurnar tilráða, gera tað undir egnari ábyrgd.